

## Yoko Ono skrivar bók um Beatles

76-ára gamla einkjan eftir John Lennon hevur sett fimm ár av til at skriva nýggja bók um kenda tónleikabólkin The Beatles. Hon hevur leingi ivast í at skriva bók um bólkin, men nú hevur hon so gjørt av at skriva um deyða mann sín og The Beatlesø Yoko Ono sigur við Yahoo.uk, at ein sjálvbiografi er næsta verkætlan hennara, og at hon fer at koma út innan fimm ár. Hon hevur annars fyrr verið afturhaldandi við at fáa útgivið minni síni um tíðina saman við John Lennon, millum annað við atliti til fyrru konu Lennon, Cynthiu. Yoko Ono hevur sonin Sean saman við John Lennon, sum doyði í 1980, tá hann varð skotin uttan fyri heim sítt av einum sinnissjúkum manni. Tað veit danska blaðið Politiken at siga.

# Fiskimenn tosa eisini um fastlønars

**Ein fundur á Klaksvíkar Sjómansheimi, sum Føroya Fiskimannafelagið skipaði fyri seinnapartin týsdagin, viðgjørdi eina fastlønarskipan fyri fiskimenn. Áður hevur Føroya Skipara-og Navigatørfelag eisini havt henda spurning frammi**

FASTLØNARSKIPAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á aðalfundi í Føroya Skipara- og Navigatørfelag millum jól og nýggjár, nam formaður felagsins, Eyðstein Djurhuus, við spurningin um setanar-og lønarviðurskiftini hjá fiskimonnum. Hann helt, at tíðin helst er komin til eina munandi nútímansgerð og vísti á kappingina, sum fiskiskipavinnan fær frá altjóða farma- og frálandaskipum, eitt nú við javnari mánaðarløn, pensjón, skipaðari frítíð og áhaldandi eftirútbúgvingum.

- Hetta hevur alt stóran týdning, tá ungir navigatørar velja sær starv, segði Eyðstein Djurhuus, formaður felagsins.

### Eisini dekkarar

Føroya Fiskimannafelag hevur nú eisini tikið spurningin um fastlønarskipan upp, og seinnapartin týsdagin helt felagið fund á Klaksvíkar Sjómansheimi fyri limum, ið høvdu hug at viðgera henda spurning.

Einir 30 mans møttu á fundinum, har høvuðsmálið var ein fastlønarskipan fyri fiskimenn.

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, sigur, at hetta var ein góður fundur, har limirnir í felagnum eisini viðgjørdu inntøkutrygdina og ymiskar tryggingarspurningar.

Hann sigur, at fiskimenn eru positivir fyri eini fastlønarskipan, sum hevur grundarlag í sáttmálanum millum fiskimenn og reiðarar.

- Vit hava fastlønarskipanir umborð á pelagisku skipunum, og nú er so ætlanin at fáa slíkar skipanir umboð á flakatrolararnar.

Jan Højgaard sigur, at ein fastlønarskipan er eitt mál, sum er í stoypiskeiðini, og tí enn torført at siga, hvussu ein slík skipan kann fáast í lag um allan fiskiflotan. Hann heldur, at tað hevði havt týdning fyri fiskimenn, tá teir eitt nú skulu tosa við bankar um privat viðurskifti, at teir kundu víst á eina fasta løn.



*Fiskimenn eru nú eisini farnir at viðgera spurningin um eina fastlønarskipan*

- Vit hava skiftiskipanir umborð á partrolarum, men enn vita vit ikki, hvussu onkur betri skipan kann fáast fyri línuflotan, sum seinnu árini ikki hevur havt sínar bestu dagar.

### Varðveita trygdina

Formaðurin í Fiskimannafelagnum sigur, at fiskimenn vilja halda fast um almennu inntøkutrygdina. Hetta kom eisini fram á fundinum í Klaksvík týsdagin.

- Eingin tímur út á hav, um ikki ein ávís trygd er fyri, at okkurt fæst burtur úr, og tí vilja fiskimenn varðveita inntøkutrygdina, sum hevur verið galdandi langt aftur í tíðina, sigur Jan Højggaard.

Landsstýrið hevði annars ætlanir um at taka játtanina til inntøkutrygd av fíggjarlógini fyri 2010, men við tað, at nevndin, sum sat og viðgjørdi hetta mál, ikki náddi undir land, er lógin framvegis galdandi, sum

# Eingin endalig avgerð um Gadus



**Herfyri kom fram, at JFK-Trol í Klaksvík hevur ætlanir um at keypa norska trolaran Gadus, men sum skilst á reiðaranum, Hanusi Hansen, er eingin avtala gjørd millum partarnar enn**

*Norski trolarin Gadus er smíðaður í Noregi í 1987, men fekk eina stóra umvæling og umbygging í 1996*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Málið um keyp av norska trolaranum Gadusi skuldi ætlandi koma undir land tíðliga í hesi vikuni, men eftir øllum at døma hevur hetta drigið nakað út.

Hanus Hansen, stjóri í JFK-Troli, segði í stuttari viðmerking í gjár, at enn er eingin endalig avtala gjørd millum partarnar.

Reiðarin ætlar, at Gadus skal koma í føroyska fiskiskipaflotan, tá øll viðurskifti í sambandi við Skálaberg eru avgreidd.

Gadus er smíðaður í Noregi í 1987, men fekk eina stóra umvæling og nútímansgerð í 1996.